

Thina Saltvedt, oljugreinari hjá Nordea Markets. Mynd: Nordea Markets

# Oljuprísurin undir trýsti frá øðrum orkukeldum

**Jógvan Hugo Gardar**

29.03.2015 - 13:16

Oljan.fo

- Sum um tað ikki skuldi verið nokk, at amerikanska skiferoljan trýstir oljuprísin í botn, so síggja vit nú avleiðingarnar av nýggjum orkukeldum, sigur oljugreinarin Thina Saltvedt hjá Nordea Markets.

Tí heldur hon at lági oljuprísurin kann koma at halda sær á verandi príslegu.

Í einum lesarabrævi í Dagens Næringsliv skrivar hon at vit í skjótt noyðast at hava við í roknistykkinum, tá vit meta um oljuprísin, at fleiri nýggjar orkukeldur eru komnar, og onkrar av hesum eru rættuliga stórar í dag.

Hon hevur fyrr víst á at ein oljuprísur sum liggur um 62 dollarar fyri eitt fat av norðsjóvaroljuni Brent, helst verður meðalprísurin í 2015.

Avleiðingarnar av einum so lágum oljuprísi, sigur hon, er at oljuframleiðararnir noyðast at umhugsa sínar ætlanir av nýggjum, tí tað kemur ikki at loysa seg at framleiða alla oljuna.

Bæði í Norðsjónum og í Barentshavinum síggja vit longu at fleiri leitiætlanir eru steðgaðar og útsettar.

Thina Saltvedt vísir eisini á at innan flutningsvinnuna, so eru fleiri sum royna nýggjar møguleikar at finna brennievnir sum koma frá øðrum orkukeldum, enn tað vit í dag kenna frá olju og gass.

- Ein grundleggjandi broyting av flutningsvinnuni kann gerast størsti "game changer" hjá vinnuni. Flutningsvinnan stendur einsamøll fyri 55 prosentum av oljunýtsluni í heiminum, og hendan vinnan hevur higartil ikki havt nakra kapping, sigur Thina Saltvedt.

DNV GL sigur í eini meting at HFO (Heavy fuel oil) kann hvørva frá marknaðinum áðrenn vit skriva ár 2015. Harafturat metir greinarafyritøkan Wood Mackenzie, at olju- og gassídnaðurin kemur at minka sínar íløgur í gransking við einum triðingi, bara í 2015, tí oljuprísurin er so lágur.